**Magnus Heinason - Túrfrágreiðing**
**Yvirlitstrolingar. Túrur nr. 0960.**
**Tíðarskeið: 29/7-12/8 - 2009**

---

**Fólk við frá Havstovuni:** Petur Steingrund, Regin Kristiansen, Kristian Zachariassen, Rógvi Mouritsen og Jens Arni Thomassen.

**Ábyrgd:** Petur Steingrund.

**Endamál:** Hetta var fyrri túrurin av yvirlitstrolingunum á heysti í ár. Høvuðsendamálið við túrinum var at fáa til vega tilfar, ið skal nýtast í stovnsmetingunum av toski, hýsu og upsa, t.e. veiða í vekt og í tali, longdarbýti, vektbýti, aldursbýti, kynsbýti og kynsbúning av nevndu sløgum. Umframt varð vekt, tal og longdarbýti skrásett fyri øll fiskasløg, ið vórðu veidd. Eisini vórðu magakanningar gjørdar av toski, hýsu og upsa. Lívfrøðiligar kanningar vórðu eisini gjørdar av havtasku. Hitin í sjónum varð máldur við miniloggarum.

**Eyka uppgáva:** Prøvar vórðu tiknir av havtasku. Bjørg Mikkelsen frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni fekk 30 upsar og 8 havtaskur.

**Reiðskapur:** 116 fóts kassatrol við 40 mm meskum í posanum. Steinhamns-lemmar. Breitlar 60 og 120 m.

**Um túrin:** Fóru av Havnini fríggjadagin 31. juli kl. 13.15. Vit tóku støðirnar á Suðuroyarbankanum, Munkagrunnunum, Sandoyarbankanum, Nólsoyarbankanum og annars allar støðirnar eystanfyri ta fyrru vikuna. Vit landaðu á Fiskamarknaðinum á Toftum hósdagin 6/8. Fóru eysturum og tóku støðirnar heilt vestur til økið vestan fyri Mykines. Tilsamans vórðu 144 hál tikin, og av teimum vórðu 135 góðkend. Vit landaðu á Toftum mikumorgunin 12/8. Veðrið var sera gott. Tíverri mistu vit tveir miniloggarar á seinastu støðini.

**Prøvataking:** Veiðan varð viðgjørd sambært kanningarætlanini og sýnishondbókini. Yvirlit yvir veiðu, nytur og magar (Talva 1) er víst niðanfyri. Tal av nytrum var eftir ætlan fyri øll fiskasløgini tosk, hýsu og upsa.

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:** Túrurin var liðugt rættaður 5. september. Ynskiligt er, at nytrurnar skulu vera lisnar og innlagdar í databasu í seinasta lagi 1. november.

**Fyribilsúrslit:** Munandi meira var at fáa av toski samanborið við samsvarandi túr í fjør (Talva 1), sum tó var tað lakasta árið síðan yvirlitstrolingarnar byrjaðu í 1996. Nakað tað sama var til av upsa og hýsu. Sum nakað nýtt fingu vit ein nýggjan høgguslokk, sum fekk navnið "tannhøgguslokkur". Hann er vanliga at finna í heitari sjógvi enn tí føroyska. Annars verður víst til túrfrágreiðingina fyri túr 0864, har úrslit fyri allan landgrunnin eru víst. Magakanningarnar vístu, at tað var eitt sindur til av nebbasild. Hinvegin ótu toskur og upsi nakað av ársins yngli hjá hvítingsbróðri. Eitt lítið sindur varð etið av smáum svartkjafti. Sera nógvir svimjikrabbar vóru í magunum. Fiskurin var sum heild sera væl fyri. Hitin við botn lá vanliga millum 7-11 $^{o}$C, men kundi koma niður móti 0 $^{o}$C á djúpum vatni.

**Talva 1**. Veiða, og nytrur (aldrar) og magar tikin á túri 0960.

| Fiskaslag | Kg í 135 støðum í 2009 | Nytrur | Magar | Kg í 132 støðum í 2008 | (Kg per støð 2009)/ (Kg per støð 2008) |
|---|---|---|---|---|---|
| UPSI | 17337.16 | 954 | 151 | 18609.79 | 0.91 |
| HVÍTINGSBRÓÐIR | 12168.61 | | | 6791.03 | 1.75 |
| HÝSA | 10582.05 | 943 | 142 | 11097.32 | 0.93 |
| LÍTLI KONGAFISKUR | 8151.63 | | | 6941.30 | 1.15 |
| TOSKUR | 7679.85 | 910 | 164 | 2612.05 | 2.87 |
| SVARTKJAFTUR | 4169.57 | 63 | | 4572.24 | 0.89 |
| GULLAKSUR | 3788.62 | | | 3144.60 | 1.18 |
| SILVURMURTUR | 2096.73 | | | 355.76 | 5.76 |
| LONGA | 1858.53 | | | 2279.65 | 0.80 |
| MAKRELUR | 1388.29 | | | 338.21 | 4.01 |
| STÓRI KONGAFISKUR | 1263.74 | | | 943.39 | 1.31 |
| TUNGA | 1147.16 | | | 806.13 | 1.39 |
| KNURRHANI | 878.15 | | | 112.47 | 7.63 |
| HVÍTINGUR | 854.19 | | | 1225.60 | 0.68 |
| BROSMA | 615.20 | | | 753.40 | 0.80 |
| TRANTKONGAFISKUR | 476.98 | | | 620.37 | 0.75 |
| ROSSAMAKRELUR | 471.98 | | | 67.22 | 6.87 |
| BLÁLONGA | 396.40 | | | 129.40 | 3.00 |
| SKRAMBUL | 354.34 | | | 452.01 | 0.77 |
| TINDASKØTA | 293.86 | | | 112.09 | 2.56 |
| HAVTASKA | 290.91 | 58 illicium | | 159.71 | 1.78 |
| REYÐSPRØKA | 284.47 | | | 202.88 | 1.37 |
| HAVMÚS | 255.80 | | | 151.67 | 1.65 |
| SVARTKALVI | 217.59 | | | 271.63 | 0.78 |
| SANDSPRØKA | 201.69 | | | 99.63 | 1.98 |
| LOLIGO | 178.74 | | | 123.89 | 1.41 |
| AGNHØGGUSLOKKUR | 159.55 | | | 71.80 | 2.17 |
| SILD | 129.25 | | | 50.01 | 2.53 |
| KALVI | 112.57 | | | 82.67 | 1.33 |
| HVASSASPREK | 89.79 | | | 72.12 | 1.22 |
| KJAFTSVARTI KONGAFISKUR | 84.65 | | | 35.54 | 2.33 |
| KJAFTSVARTI HÁVUR | 69.84 | | | 47.40 | 1.44 |
| STEINBÍTUR | 50.28 | | | 17.49 | 2.81 |
| BLÁGÓMUR | 49.62 | | | 0.00 | |
| LÁLLA | 45.26 | | | 46.19 | |
| GLASKVOYSA | 31.27 | | | 57.22 | |
| HALAHVASSA SKØTA | 25.26 | | | 0.00 | |
| LÍTLA BROSMA | 20.85 | | | 0.00 | |
| SKØTA | 16.55 | | | 5.76 | |
| KLINGRUSKØTA | 10.16 | | | 2.87 | |
| LIRI | 8.90 | | | 22.76 | |
| LÝRUR | 8.30 | | | 12.64 | |
| BRAMAFISKUR | 3.65 | | | 0.00 | |
| LYCODES ENDIPLEURISTCTUS | 3.46 | | | 2.06 | |
| GLÝSUFISKUR | 3.02 | | | 3.78 | |
| ULVFISKUR | 1.77 | | | 6.76 | |
| HÁVUR | 1.70 | | | 0.00 | |
| KRØKILSKRUTT | 1.42 | | | 0.94 | |
| SVARTFISKUR | 1.17 | | | 3.70 | |
| LITLA LAKSATOBIS | 0.88 | | | 0.00 | |
| ELEDONE | 0.45 | | | 0.28 | |
| TANNHØGGUSLOKKUR | 0.33 | | | 0.00 | |
| HAVNEBBASILD | 0.18 | | | 0.00 | |
| RÆKJA | 0.12 | | | 0.18 | |
| BLÁRIDDARI | 0.07 | | | 0.00 | |
| TARABROSMA | 0.01 | | | 0.00 | |
| GESTFISKUR | 0.01 | | | 0.00 | |
| NEBBASILD | 0.01 | | | 0.03 | |
| TILSAMANS | 78332.54 | 2870 | 457 | 0.00 | |

**Viðmerkingar:** Fiskalistin í imponatorskipanini má dagførast.

Petur Steingrund